

Jenis av Rana

# Miðflokshugsanin tryggjar eisini ófødda barnið!

*... ein viðmerking til fosturtøku-hugsanir nýggju fólkafloksmanna*

... »Fólkaflokkurin eigur at ganga á odda við eitt nú fríari fosturtøku« - soleiðis ljóðar ein av boðskapunum, ið portalurin bar okkum frá landsfundi Fólkafloksins farna vikuskiftið. Ikki var talan um tilvildaligan landsfundarluttakara, men formann unga fólkafloksins, sum gav okkum innlit í tær hugsanir, sum hesi, sum um nøkur ár mynda flokkin, hava í huga at virka fyri.

Eitt hugsa samskifti við ófødda barnið.

Í miðdeplinum í fosturtøkuspurninginum finna vit ófødda barnið. Trygt og fjálgt búnast tað dag frá degi í fyribils bústaði tess, ávegis í tann spennandi heim, sum verður bústaðurin komandi árini, vónandi til lívið náttúrliga fjarar burtur. Ímynda tær, at vit fingu orð á barnið og greiddu frá, at ein deyðsvandi lúrdi áðrenn føðing, og at ikki var víst, at samfelagið vildi játta tí atgongd til lívið. Eg kann ikki ímynda mær tað undran, vantrúgv og ræðslu, barnið hevði møtt okkum við. »Jamen øll gleða seg til eg komi«. Væl havi eg hoyrt, at mamma og pápi stríðast við trupulleikar, men læknavísind og sosialu- og fíggjarligar skipanir fara jú at hjálpa teimum og mær, so har skuldi eingin trupulleiki verið. Og eg eri jú, eins og øll onnur, vart av rættartrygdini, sum øll framkomin lond veita borgarum sínum?

Hvussu ætlar fólkaflokkurin at samskifta við ófødda barnið?

At samskifta við ófødda barnið, sum omanfyri hugsað, ber jú ikki til- ella? Ivi mín kemst av ætlanum fólkafloksleiðarans, at: »fólkaflokkurin eigur at ganga á odda við eitt nú fríari fosturtøku«. Skal tað gerast, má høvuðspersónurin, hann sum fær atgongdina til lív sítt noktaða, væl spyrjast? Um barnið, sum eigur tað lív, ið skal steðgast, ikki verður spurt, so er jú ikki talan um fría fosturtøku? Letur tú onnur, politikkaran við sjúku lóg síni, læknan við brýndu samvitsku sínari ella foreldur við trupulleikum sínum ( sum sjálvandi skulu hjálpast! ) taka avgerðina, so er hon ikki frí longur, men kroyst niður yvir rætt barnsins til egið lív.

Óivað sjúkasta hugsan, sum nakrantíð er hugsað.

Tá hugsanin um at fara inn í móðurlív eftir ófødda barninum fyrstu ferð varð hugsað, var talan um hugsan, og harav avleidda gerð, sum átti at verið abortera í føðingini. Tíverri varð henda hugsan hinvegin fagnað, og lond efir lond fóru, ístaðin fyri at veita sperdum foreldrum neyðugu hjálpina, at brúka peningin at statsfíggja ógerðina.

Í framkomnu samfeløgum okkara eiga vit at taka hendur saman, veita mammun og foreldrum allan neyðugan stuðul og bjóða hvørjum einstøkum gitnum føringi, sum í dag búleikast í móðurlívi, vælkomnum ímillum okkum at verða!



Heðin Mortensen
*borgarstjóri*

# Hertil og ikki longur!

*Tórshavnar kommuna fer ikki at góðtaka, at landið fer at niðurlaga eldraøkið í Suðurstreymoy við at spara burtur búpláss og røktarstarvsfólk, samstundis sum kommunan og borgarar í høvuðsstaðnum leggja rygg til stórar íløgur á eldraøkinum – ið enn er ein landsuppgáva!*

Øvugtur Robin Hood-politikkur.

Hetta er tað, vit í seinastuni hava upplivað frá landsmyndugleikanum á eldraøkinum.

Tað, sum kommunur royna at byggja upp við at skapa fleiri røktarheimspláss, brýtur landið niður við tilvildarligum sparingum á almannaøkinum.

Eldrapolitikk síggja vit lítið og einki til.

Men hví rópa varðskó, áðrenn vit kenna úrslitið?

### Vónbrotið í Vági

Suðuri í Vági síggja vit øvugta Robin Hood-politikkin í verki.

Við einum lyfti frá landsstýrinum í rygginum hava fýra kommunur í Suðuroyar sunnaru helvt tikið lán og gjørt eina stóra íløgu í eitt nýtt ellis- og røktarheim.

Lyftið gekk út uppá, at 24 eldri borgarar skuldu fáa pláss á heiminum, og at tilsvarandi tal av røktarstarvsfólkum skuldu koma í starv.

Men hvat hendir?

Jú, landsstýrið rennur undan sínum lyfti. Robin Hood tekur aftur tað, sum hann upprunaliga gav sum lyfti.

Almannaverkið gevur boð um at spara burtur búplássini hjá átta eldri borgarum. Harnæst fáa eisini eini 15 røktarstarvsfólk boð um, at brúk er ikki fyri teimum longur.

Landsstýrið gevur við aðrari hondini og tekur við hinari. Eftir sita kommunurnar, sum hava skuldarbundið seg fyri at loysa eina landsuppgávu, men fáa tó ikki tað, sum landsstýrið lovaði.

### Royndirnar úr Vági

Hóast eldrarøkt er ein uppgáva, ið landsstýrið sambært lóg eigur at taka sær av, so forsømir landsstýrið at hjálpa teimum eldru, ið hava røkt fyri neyðini.

Tørvurin á røktarplássum eins og á heimarøkt í Tórshavnar kommunu er stórur, og hvørki tey eldru, familjur teirra ella vit sum kommuna kunnu bíða eftir einum landsstýri, ið ikki tekur sína uppgávu í álvara.

Í Tórshavnar kommunu fara vit tí ein av næstu døgunum at seta spakan í og grava út fyri nýggja Boðanesheiminum yviri við Strond.

Talan er um eitt røktarheim við 64 búplássum til okkara eldru borgarar, og ætlanin er, at heimið skal takast í nýtslu í 2012. Tilsamans kostar heimið uml. 120 milliónir krónur. Landið rindar umleið ein triðing í íløgustuðuli, hóast lógin í veruleikanum leggur upp til, at kommunur skulu hava helvtina í stuðli.

Taka vit støðuna í Vági sum dømi og yvirføra hana á Tórshavnar kommunu, ja, so er fryktandi fyri, at landsstýrið eisini her fer at spara burtur verandi búpláss eitt nú á Ellisheiminum og ymsu sambýlunum og fremja hópin av uppsagnum millum røktarstarvsfólk.

Vit skulu jú minnast til, at landsstýrið hevur longu boðað frá, at landskassin skal spara munandi komandi árini, og veruleikin er, at hvørt búpláss á røktarheimi kostar landskassanum umleið hálva millión í rakstri.

Tann hóttandi myndin sær tí soleiðis út, at meðan vit í kommununi sjálvboðið gera alt, sum vit eru ment, fyri at bøta um støðuna hjá okkara eldru, ja so niðurlagar landsstýrið almannatænasturnar í kommununi og tekur frá teimum eldru. Hetta fevnir ikki bert um røktarheimini, men eisini heimarøktina, sum longu er pínd niður í nærum einki.

Hetta skundar so upp aftur meira undir tørvin á fleiri røktarheimsplássum, ið er so nógv tann dýrasti rakstrarformurin innan alla eldrarøkt, og tað sum allar kanningar vísa, at tey fægstu eldru ynskja sær. Men kortini er hetta einasti formurin, ið landið veitir stuðul til.

Í roynd og veru tekur landsstýrið tann virðiliga aldurdómin frá okkara eldru medborgarum og sendir rokningina og ábyrgdina til kommunurnar.

### Ongin Vágs-loysn í Tórshavn

Nú, áðrenn spakin verður settur í til Boðanesheimið, vil eg sum borgarstjóri í høvuðsstaðarkommununi sláa rimmar fast, at vit fara ikki at góðtaka, at landið niðurlagar eldraøkið í kommununi.

Landsstýrið sleppur ikki at gera eina Vágs-loysn í Havn. Tórshavnar kommuna fer ikki at góðtaka, at landið forsømir okkara eldru, at landið steingir okkara ellisheim, ella at landið lagar niður umlætting og røkt í Tórshavnar kommunu.

Landið sleppur ikki at sløkkja ljósið hjá okkara eldru borgarum.